# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt ár við Obama

Í dag er eitt ár síðani Barack Obama varð valdur til forseta í USA. Kring allan heimin var gleðin stór, tá Obama vann forsetavalið og tók við eftir Bush, sum hevði rátt fyri borgum í USA í samfull átta ár.

Nú var bráddliga íkomin ein heilt nýggjur møguleiki at skapa frið og ikki minst birta nýggja vón hjá milliardum av fólkum kring knøttin. Tíðin var komin til broytingar var boðskapurin hjá nýggja amerikanska forsetanum. Ikki bert broytingar í heimlandinum USA men kring allan heim.

Aftaná eitt tíðarkeið við bardaga Bush móti óndu kreftunum byrjaði við Obama eitt nýtt tíðarskeið, sum skuldi byggja á sínamillum virðing, dialog og tolsemi. USA og heimurin høvdu brúk fyri einum Obama og tí hugburðsbroyting hann stóð og stendur fyri.

Nú er so eitt ár farið og spurt verður, um boðskapurin hjá Obama hevur rinið við og um hann sæst aftur í ítøkiligum úrslitinum! Eygleiðarar eru ymiskir á máli men fleiri halda tað vera alt ov tíðliga at fella dóm yvir Obama, nú hann bert hevur sitið við valdið í eitt ár. Hugburðsbroytingin má hava tíð til at festa seg. Í heimlandinum hevur Obama megnað tað eingin annar undan honum hevur, at sannføra ein meiriluta av amerikanarum, at heilsutrygd er ein rættur hjá øllum. Hóast bakbit og ein ræðukampanja av fúlasta slag, ikki sørt lík tí, sum propagandamaskinan hjá Hitler og Goebles stóð fyri, eitt nú frá ultrakonseravativu sjónvarpsrásini Fox, so hevur Ombama kortini megnað at sannføra tjóðina um, at nýggja heilsuskipanin er rætti vegurin at ganga.

Og taka vit heimsbúskapin, sum er so nógv tengdur at gongdini í USA, so halda fleiri eygleiðarar, at um ikki Obama varð so støðufastur og fór inn við almennum pengum at bjarga fíggjarskipanini í USA, so fór alt fíggjarkervið í heiminum fyri bakka. Vit hava eisini sæð hann geva grískum bankastjórum nevan frammaná, tá teir eftir at hava fingið almenna hjálp kortini hava goldið sær risabonus.

Taka vit so støðuna í krígsherjaðunum og óstabilum økjum í heiminum, er greitt, at vónirnar til at Obama fór at greiða flókjurnar hava verið ómetaliga stórar. Torført er eftir stutta tíð at fáa framt stórar broytingar í Irak og Afganistan. Vit mugu bara seta okkara álit á, at amerikanska stjórnin fer at taka tey skilabestu stigini í hesum báðum londunum. Síðani er tað Miðeystur, sum øll vita, er so torført at finna loysnir fyri. Nýggi ísraelski forsætisráðharrin hevur ikki gjørt tað lættari hjá Obama, nú hann ikki vil steðga niðursetufólkunum at byggja nýtt land á palestinskum øki. Eisini her mugu vit bara vóna, at tíðin fer at arbeiða fyri eini loysn. Onnur vandaøki eru Iran, Pakistan og Norðurkorea. Í sambandi við Iran og Norðurkorea er talan um at halda fram við eini blanding av trýsti og átøkum móti londunum og einum dialogi. Umráðandi er ikki at missa tolið og eggja til kríggj. Vit kunnu bara ímynda okkum avleiðingarnar, um Ísrael sleppur at bumba Iran. Helst eigur Obama at geva Pakistan nógv størri ans. Her lúra helst teir størstu vandarnir í løtuni. Gevið Obama meira tíð til at røkka málum okkara.

**Sosialurin**

## Vit liggja, sum tit hava reitt!

**ANN HOVLAND**

sjúkrasystir

Móti betri vitan hava serliga tjóðveldiskvinnurnar Bjørt og Bergtóra í seinastuni hvest pennarnar mótvegis landsstýrinum, nú krubban er tóm. Sama hava onnur loysingarfólk gjørt. Men orsøkina til tómu krubbuna eiga fyrst og fremst somu loysingarfólk. Tí er tað so umráðandi hjá loysingarfólki at flyta fokus frá blokkniðurskurðinum yvir á landsstýrið.

Aftur og aftur havast loysingarfólk og serstakliga tjóðveldiskvinnurnar Bjørt Samuelsen og Bergtóra H. Joensen at landsstýrinum. Atfinningarnar eru oftast vendar móti Rósu Samuelsen, sum umsitur almannamál.

Hóast landsstýriskvinnan í almannamálum ger eitt dygdargott arbeiði og roynir at fáa roknistykkið at ganga upp við teirri avmarkaðu peninganøgd, henni er tillutað, fær hon bert atfinningar.

**Landsstýrikvinnan økta játtan**

Krubban er tóm. Hallið á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2010 er uml. 800 mió. kr. Men hóast tað, er tað eydnast landsstýriskvinnuni at fáa somu upphædd ella enntá eitt vet meiri til júst sítt málsøki.

Men tað sær út sum um tjóðveldiskvinnurnar púrasta síggja burtur frá, at tað júst var teirra flokkur, sum gekk á odda at skerja blokkin í 2002. Um blokkurin ikki var skorin niður og prístalsviðgerðin sett úr gildi, hevði nógv sæð øðrvísi út í dag, serliga hjá teimum sjúku, veiku og gomlu.

**Kostað okkum 3,8 mia. kr.**

Lesið bara greinina hjá skilamanninum Hera Mohr, um hvussu loysingarflokkarnir hava drenað landskassan! Nú høvdu tær 3,8 mia. kr., sum ørvitisøðrskapur tykkara hevur kostað okkum borgarum, komið væl við.

Men nú liggja vit, sum tit hava reitt.

## Viðvíkjandi frágreiðing frá landsgrannskoðaranum

*Tíðindaskriv*

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum staðfestir, at hann hevur endaligu ábyrgdina av Fíggjarmálaráðnum og øllum stovnum undir ráðnum. Tískil verður frágreiðingin frá landsgrannskoðaranum tikin í størsta álvara.

**Mvg**

Landsgrannskoðanin vísir í síni frágreiðing til mvg-eftirstøðurnar. Veruleikin er, at mvg- eftirstøðurnar eru minkaðar seinastu árini. Tó eru tær vaksnar aftur í 2009, men orsøkin til tað er gjaldsføriskreppan, sum hevur rakt allan heim. Ein so álvarsom kreppu hevur beinanvegin ávirkan á eftirstøður til tað almenna.

Skiftandi leiðslur á TAKS hava lagt sera nógva orku í innkrevjing og eftirlit á mvg-økinum. Onkuntíð hava viðmerkingar verið um, at ov nógv orka hevur løgd í júst hetta økið.

Samanborið við Danmark er mvg-eftirstøðan í Føroyum lutfalsliga lægri. Ein mvg-skipan kann ongantíð tryggja, at allur peningur kemur inn, tí fyritøkur steingja ella fara á húsagang.

**Leiðreglur fyri eftirlit**

Viðvíkjandi TAKS er tað rætt, at tað ikki í øllum førum hevur gingið nóg skjótt at seta tilmælini frá landsgrannskoðarunum seinastu árini í verk.

Eitt høvuðstilmæli undanfarin ár var at seta nýggja roknskaparreglugerð í gildi. Hetta er gjørt og arbeitt verður eftir nýggju roknskaparreglugerðini.

Landsgrannskoðarin hevur í fleiri ár havt viðmerkingar um, at TAKS ikki hevur skrivligar leiðreglur á øllum økjum. Á flestu økjum eru leiðreglur, men allar eru ikki skrivligar.

TAKS hevur eitt sera umfatandi eftirlit á øllum skatta- og avgjaldsøkinum. Best hevði verið at havt skrivligar leiðreglur á øllum økjum, men dygdin á eftirlitinum eru minst líka nógv knýtt at útbúgving og skipan av eftirlitinum.

**Kapitalvinningsskattur**

TAKS hevur á hesum økinum gjørt eitt sera gott arbeiði. Tað hevur víst seg, at nógv sum handlaðu við partabrøvum fyri nøkrum fáum árum síðani, ikki boðaðu TAKS frá møguligum vinningi við sølu av partabrøvum. TAKS hevur gjørt eitt stórt arbeiði at fingið henda kapitalvinningin skrásettan. TAKS arbeiðir í løtuni at innkrevja skatt av umleið 25-30 mill. kr. sum ikki hava verið fráboðaðar TAKS.

**Rentuskattur**

Spurningurin um manglandi rentuskatt frá Kaupthing kemst av eini misskiljing. Tá Kaupthing gavst í Føroyum vóru ymsar millumrokningar sum skuldu gerast. Einki er sum bendir á, at landskassin missir nakran rentuskatt í sambandi við bankavirksemi hjá Kaupting í Føroyum.

**Fíggjarmálaráðið**
*2. november 2009*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.